Undirvísingargongd til Kennir tú Pippi Langsokk?



Astrid Lindgren

Kennir tú Pippi Langsokk?

Myndir: Ingrid Vang Nyman

Týtt: Turið Sigurðardóttir

Bókadeild Føroya Lærarafelags 1997

Hetta er eitt uppgávuhefti, sum Katrin Matras Absalonsen, Judith Højgaard og Súsanna Mørk Jóanesarson hava gjørt í sambandi við starvsvenjing hjá læraralesandi á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

Arbeiðsheftið hóskar væl at brúka til 3. flokk í føroyskum.
Dentur verður lagdur á mállæru, serliga verður nokk so fitt arbeitt við navnorðum og sagnorðum.
Nomið verður eisini við lýsingarorð.
Arbeitt verður eisini við at skilja lisna tekstin og við samansettum teksti (orð og mynd).
Stavseting verður vand.

Bókin og heftið vórðu brúkt afturat øðrum tilfarið í føroyskum. Flokkurin hevði tríggjar dupulttímar um vikuna og tilfarið varð brúkt tær tríggjar vikurnar starvsvenjingin varð.
Næmingarnir lósu eitt brot úr bókini heima, lósu upp í skúlanum og arbeiddu síðan í arbeiðsheftinum í skúlanum. Tað var upp til hvønn einstakan næming, um hann las fyri flokkinum.
Uppgávurnar eru gjørdar til sjálvstøðugt arbeiði, men næmingarnir gjørdu sjálvir av, um teir arbeiddu saman.